


# Arabo fegnast um hepna útbjóðing

Jan Müller

12.12.2013 - 20:50

Oljan.fo

Tá Ben Arabo tíðliga í morgun ringdi við klokkuni á Oslo Børs var tað fyri at boða frá, at nú ber til at handla við partabrøvunum hjá Atlantic Petroleum á Oslo Børs.

Í sambandi við skrásetingina hevur Atlantic Petroleum júst fullført eina kapitalhækking, har gott 1 mió. nýggj partabrøv vórðu givin út. Partabrøvini vórðu seld fyri 140 norskar krónur fyri partabrævið. Hetta gevur felagnum millum 113-133 mió. krónur í kassan, ið millum annað skulu brúkast til at seta ferð á leitivirksemið í norskum øki.

Ben Arabo sigur í fráboðan, at hann frøðist um, at útbjóðingin hevur gingið væl, og at íleggjarar hava víst felagnum álit. Serliga er hann væl nøgdur við at felagið hevur fingið fleiri nýggjar stovnsligar íleggjarar.

Ein av orsøkunum til at felagið hevur valt at fara á Oslo Børs er, at norska íleggjaraumhvørvið kennir meira til feløg, ið eru virkin í oljuvinnuni. Atlantic Petroleum metir, at hetta fer at føra við sær størri uppmerksemi um partabrævið, av tí at norskir íleggjarar og greinarar hava serkunnleika á olju- og gassøkinum.

Við nýggju partabrøvunum eru íalt 3.676.703 partabrøv í felagnum, við einum áljóðandi virði á 100 kr. hvørt. Atlantic Petroleum fer framhaldandi at verða skrásett á danska virðisbrævamarknaðinum NASDAQ OMX, men fer av íslendska marknaðinum í næstum.